# Lastbilarnir úr býnum

Ein avleiðing av nýggju parkeringsskipanini í Tórshavnar Kommunu verður tann, at lastbilar framyvir ikki skulu standa parkeraðir inni í býnum. Ístaðin fáa teir ávíst eitt øki á Skarðshjalla.

Lastbilar hava áður fingið ávíst nøkur støð inni í býnum, har teir kunnu parkera, men við nýggju skipanini fer hetta í søguni. Eitt stórt øki á Skarðshjalla, sum kommunan eigur, verður gjørt til lastbilaparkering, so at sleppast kann undan, at hesir koma inn í miðbýin.

**tn**

# Jólabøkur til fólkið



*Guðrun Magnussen (hm.) tekur sær av sølubúðini hesar dagarnar, og vísir her einum kunda á eina góða jólabók*

Møguleikin at keypa kristiligar bókmentir er vorðin betri, nú Heimamissiónin hevur jólasølu av bókum í Meinigheitshúsinum í Havn.

Fyrr í vikuni lat nevniliga upp ein sølubúð við øllum tí tilfarinum, sum Heimamissiónsforlagið í Nesvík hevur av bókum, fløgum og gávulutum.

Sølubúðin í Meinigheitshúsinum lat upp mánadagin og er opin fram til komandi leygardag. Opið er seinnapart á degi.

Annars finnast aðrir handlar, sum eisini selja kristiligar bøkur. Millum hesar er Logos og Luthers Bókhandil.

sb.

# Spreinging í amerikanskum íbúðarrhúsum

Eini amerikansk íbúðarhús rapaðu saman av eini sterkari spreinging í Bergenfield, New Jersey í dag. Bjargingarfólki leitar enn eftir einum fólki í leivdunum, skrivar heimasíðan hjá Ekstra Bladet.

30 familjur búgva í húsunum, og tey flestu slupp óskalaði út, men fleiri hava fingið løstir. Sambært Ekstra Bladet væntar løgreglan, at orsøkin til spreingina var, at handverkarar vóru ov nær einum gassrøri, tá teir fluttu ein oljutanga.

**- nud**

# Lønarútgjaldingarnar vaksa



*Tað er serliga innan fiskiskapin, at lønarútgjaldingarnar eru vaksandi. Útgjaldingarnar í november mánað í ár vóru 29 prosent hægri, enn tær vóru sama mánað í fjør.*

*savnsmynd*

**Hóast greið tekin hava verið um afturgongd í føroyska samfelagsbúskapinum, so vísa hagtøl hjá Hagstova Føroya, at lønarútgjaldingarnar eru vaksandi.**

**BÚSKAPUR**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á heimasíðu sínari veit Hagstovan at siga, at lønarútgjaldingarnar í november mánað í ár vóru 31 milliónir meira enn sama tíðarskeið í 2004. Í prosentum svarar hetta til ein vøkstur upp á seks prosent.

Sambært heimasíðuni er tað serliga fiskiskapurin, ið hevur vøkstur. Á hesum øki vóru lønirnar 19 milliónir hægri enn í fjør, og tað er ein vøkstur upp á 29 prosent. Men eisini innan fiskavøruídnaðin eru lønarútgjaldingarnar vaksandi. Tríggjar milliónir vóru goldnar meira í lønum innan fiskavøruídnaðin í november í ár í mun til í fjør, og tað er ein vøkstur upp á góð átta prosent. Eisini hevur lønarvøkstur verið innan annan ídnað, flutning, fígging og trygging. Hinvegin hevur afturgongd verið í lønarútgjaldingunum innan ali- og kryvjivirki, handil og umvæling, gistingarhús og matstovur, skrivar Hagstovan á heimasíðu sínari.

# Býráðið skal hava fjølmiðlafólk

**Í hesum døgum søkir Tórshavnar Kommuna eftir einum fjølmiðlafólki. Talan er um eitt nýtt starv, og Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at stórur tørvur er á einum slíkum fólki í býráðsumsitingini**

**TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í starvslýsingini stendur at lesa, at fjølmiðlastarvsfólki fer millum annað at hava sum uppgávu at skipa kunningarpolitikkin hjá kommununi, at ritstjórna kunningarrit, dagføra tíðindi bæði á heimaneti, interneti og á kunningartalvum í kommununi.

### Tørvur á góðari kunning

Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, dylur ikki fyri, at tað er stórur tørvur á einum slíkum persóni í býráðsumsitingini.

- Vit hava nógv tíðindi, sum skulu út, og tí hevur tað týdning, at tað verður gjørt á rættan hátt. Borgararnir í kommununi skulu vita, hvat fer fram, og tí skal heimasíðan, kunningartalvur og annað dagførast regluliga, og tað krevur eitt fólk at taka sær av øllum hesum uppgávum, sigur Heðin Mortensen.

Sambært borgarstjóranum hevur býráðið eisini ætlanir um, at tær svørtu kunningartalvurnar, sum standa ymsastaðnis í kommununi, verða skiftar út við elektroniskar talvur, sum verða stýrdar av Snarskivuni. Tann fyrsta av hesum elektronisku talvunum verður sett upp í Gongugøtuni í næstum, greiðir Heðin Mortensen frá.

Sambært starvslýsingini skal fjølmiðlafólkið hava lokið fjølmiðlaútbúgving og hava royndir á økinum. Starvið verður væntandi sett frá 1. mars komandi ár.

# Ljómur í Suðuroynni

Sunnudagin 18. desember hevur Kirkjukórið Ljómur tvær konsertir í suðuroynni.

Undir leiðslu av Dorte Tilma verður fyrst sungið í Hvalbiar Kirkju. Tann konsertin er kl. 14.Seinnapartin - kl. 17 - verður konsert í Vágs Kirkju.

Sagt verður um skránna, at á hesari eru føroyskir, enskir og eisini latínskir jólasangir. Esiini hevur konsertin luttøku av einum gentukóri.

**-mørk**